Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Leyst grót í Gásadalstunlinum og tunlum annars

Spurningar:

1. Er Landsverk vitandi um grótið, sum javnan dettur niður undan loftinum í Gásadalstunlinum?
2. Rapar grót javnan undan loftinum í smáu tunlunum í Føroyum?
3. Er nøkur skaðafráboðan um hetta?
4. Hvat verður gjørt fyri at forða fyri, at skaði stendst av omanlopi í tunlum?
5. Eru hesir tunlar nóg tryggir fyri fólk og akfør?
6. Nær kunnu fólk kenna seg trygg við at brúka hesar tunlar?

Viðmerkingar:
Javnan verður boðað frá, at grót dettur undan loftinum í Gásadalstunlinum. Hetta kann gerast sera álvarsamt, tí fólk ganga javnan gjøgnum tunnilin umframt tey akfør, sum koyra har. Serliga summarhálvuna gongur nógv fólk har.

Eisini ganga skúlaflokkar og aðrir bólkar ígjøgnum tunnilin, serliga summarhálvuna. Hetta er helst galdandi fyri fleiri tunlar í Føroyum.

Spurningurin er, um tað skal ein álvarsligur skaði til, áðrenn nakað munagott verður gjørt fyri at tryggja loftið. Enn detta grót og steinar javnan undan loftinum í Gásadalstunlinum.

Fyri at fáa at vita, hvussu støðan er, og hvør ítøkiliga ætlanin er fyri at tryggja hesar tunlar, verður hesin spurningurin settur.

Á Løgtingi, 28. januar 2025

Jóhannis Joensen